LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008




# NissuTing

*Lag: Nissumamma og nissupápi........*

Nissukonur og nissumenn, sita inni á Tingi,
nissugávur, nissuløn hava tær nú fingið.
Klóka nissa - pena nissa,
smarta nissa - eydnu nissa,
eyguni tey glampa,
allar nissur trampa.

Reyða mappu, pengapung, allar nissur hava,
goyma sína eftirløn, og meira til sín skava.
Reyvalummin tjúkkur er,
hetta er jú besta verð,
sum tær allar nýta,
eingin vil tær slíta.

Allar nissur eru nú, mettar og so glaðar,
ræstan fisk og garnatálg ei til nissumagar.
Sushi, búff og dunnusteik,
rísingreyt og sleikisneis,
og ein stóran pakka,
fólkinum nú takka.

Pakkar eru ymiskir, harðir og so bleytir,
harðir eru allarbest, men allir gera skreytir.
Bleytir krevja vit og skil,
oftast vil tað illa til,
tí nissur ikki skilja,
hvat ið tær tá vilja.

Valdømir og bilahol stóð á ynskilista,
nissur vildi hava sítt, á Tingi sum tað fyrsta.
Grát og grenj um hvat og nær,
pengarnir hjá tær og mær,
eingin spurdi eftir,
fíggjarlóg í pettir.

Nú tað aftur verða skal, nissuval í Føroyum,
allar nissur gleða seg, og hjálpa øðrum hvørjum
allar nissur lova nógv,
summar lova stemmutjógv,
aðrar bilatunnlar,
onkur oljubrunnar.

Nissukonur og nissumenn, elska Nissutingi,
nissugávur, nissuløn, sum tær hava fingið .
Klóka nissa - pena nissa,
smarta nissa - eydnu nissa,
eyguni tey glampa,
fólkið niður trampa.

**Gleðilig jól & gott nýggjár.**
**Mourits**

# Sambandið valdi taktikkin fram um ábyrgdina, leyp í føvningin á Tjóðveldinum - og blakaði tey góðu málini fyri borð

Val



HANS PAULI STRØM
Javnaðarflokkurin

Tað var ógviliga hugstoytt, tá Sambandið fyri eini viku síðani stakk samgonguna í ryggin og fór í part við Tjóðveldinum. Tí samstundis blakaðu teir eina røð av stórum góðum samgongumálum fyri borð, so tey ikki kundu verða endaliga samtykt og koma í gildi.

Hetta var ein ábyrgdarleys avgerð hjá Sambandinum, tá man hugsar um teir stóru negativu avleiðingarnar fyri vælferðina í Føroyum. Tí avgerðin beindi fyri nógvum góðum málum, sum lógu bæði í Vinnunevndini, Mentanarnevndini, Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini – harí øll fíggjarlógin – eitt tað besta fíggjarlógaruppskotið nakrantíð fyri alt vælferðarøkið.

Tað tók edmundsvonginum ein heilan dag at kroysta flokkin til hesa avgerðina, og grundgevingarnar eru eisini ússaligar. Onnur var uppskotið hjá John um nýggjan studentaskúla – men tað hevði hann tikið aftur 5 tímar áðrenn avgerðina hjá Sambandinum. Hin var uppskotið hjá Anfinn um tunnil Norður um fjall, har ein av fremstu sambandsmonnunum eisini var uppskotsstillari. Men tað hevði Sambandið livað við í 14 dagar - haruppií ein samgongufund – uttan at øna eitt orð! Helst tí teir høvdu fingið at vita frá samgonguumboðunum í Vinnunevndini, at hetta var eitt paraduuppskot, sum ikki varð tikið undir við. So tá Sambandið vísir til politiska ábyrgd, so pynta teir seg við læntum fjaðrum. Hetta við “ábyrgd” var uppfunnið til dagin - berur taktikkur fyri at stinga hinum samgonguflokkunum politisk skør.

**Sambandið forroknaði seg...**

Sambandið gremur seg nú aftaná um at løgmaður ikki nýttist at útskriva val beinanvegin, fyri tað um teir høvdu slitið samgongusamstarvið. Eg veit at Sambandið fullkomiliga varð tikið á bóli tórskvøldið – teir høvdu als ikki roknað við at løgmaður tók avleiðingarnar av teirra undanstøkking og útskrivaði valið beinanvegin - tí teir høvdu roknað við at sloppið at fingið 1-2 dagar aftrat at pilka nøkur av málunum, sum lógu í nevndunum, burturúr og fáa tey samtykt, áðrenn endaligu freistina leygardagin t. 8. des.

**Ein ábyrgdarleysur taktikkur**

Henda dulda ætlanin hjá Sambandinum avdúkar manglandi ábyrgd og virðing fyri tingviðgerðini av málunum. Nevndirnar vóru als ikki lidnar við viðgerðina av málunum. Men eftir ætlanini hjá Sambandinum skuldi samgongumeirilutin so bara steðga allari viðgerð í nevndunum, skriva álit í óðum verkum og skrumbla málini ígjøgnum 2. og 3. viðgerð í løgtinginum við at bróta allar tíðarfreistir – alt uppá hálvanannan dag!

Ógjørligt! Og tað hevði verið brot á allar fólkaræðisligar mannagongdir. Tí var rætt, at løgmaður tók avleiðingarnar av, at Sambandið leyp frá, og útskrivaði valið.

**Øll hesi góðu málini?**

Tey koma øll aftur fyri tingið í februar, tá nýggja løgtingið kemur saman-aftur. Tað syrgir Javnaðarflokkurin fyri.

# Um harðar og bleytar jólapakkar – og um politiska ábyrgd

Val



TUMMAS Í GARÐI
Valevni hjá fólkaflokkinum

Flestu smádreingir vilja heldur hava harðar jólapakkar enn bleytar.

Í hørðu pakkunum er oftani leikutoy ella óneyðugt tingel-tangl.

Oftast eru tað kvinnurnar: ommurnar og mammurnar sum syrgja fyri at tær nyttugu gávurnar – tær bleytu - , liggja undir trænum.

Tá fyrsti gleðisrúsurin er av, og køldu vetrardagarnir í januar koma, er gott við pløggunum sum vóru í “bleytu pakkunum”.

Soleiðis er eisini í samfelagnum Føroyar: vit ynskja okkum alt møguligt “leikutoy”, men fyri at framhaldandi menning, og luttøka í Europeiska samstarvinum skal tryggjast komandi ættarliðum, er neyðugt at vit nú raðfesta teir “neyðugu” bleytu pakkarnar, so sum vitan, útbúgving, gransking og vælferðar/ heilsuskipan.

Eisini mugu vit staðfesta, at kvinnurnar oftani eru tær ið best duga skyna ímillum , hvat er “leikutoy”, og hvat er alneyðugt ( og so eru vit nakrir menn sum eisini hava skilt tað, tíbetur)

Eg sat á áhoyraraplássunum í tinghúsinum hóskvøldið, og kendi tað á ein hátt sum ein lætta tá løgmaður at enda “hálaði stikkarin úr” og sløkti samgonguna– annars hevði alt tað politiska“jólatræði” futtað av. Ábyrgdarloysi er kortini stórt, soleiðis at blakað samfelagið út í valstríðið, uttan at hava loyst tað grundleggjandi politisku uppgávuna: at syrgja fyri at ein samtykt fíggjarlóg fyriliggur

Mítt ynski er at vit eftir valið komandi fáa eina tingmanning sum skilir og megnar politisku uppgávuna, nevniliga neyv og røtt raðfesting, og ikki brúkar alt til “harðar pakkar”.

# Reytt kort til Sosialin og Óla P

ANNI Á HÆDD



Karikaturtekningin av Kitty May Ellefsen spreingir øll etisk og moralsk mørk fyri, hvussu langt ein fjølmiðil kann loyva sær at fara í síni "skemtiligu" niðurgerðing av einum persóni.

Ljóti boðskapurin í tekningi kann fyri kvinnurnar í hesum landi samanberast við karikaturtekningarnar av profetinum Muhammed í Jyllandsposten, sum leyp øði á muslimska heimin. Hvat billa Sosialurin og Óli P. sær inn at niðurgera eitt kvinnuligt valevni, eina konu og mammu á slíkan hátt? Við hesi karikaturtekning eru Sosialurin og Óli P. dumpaðir. Tekningin er hvørki stuttlig ella skemtilig. Heldur myndar tekningin ta fáfongd, sum valdar millum mannfólk, tá sterkar, vælútbúnar kvinnur tora at trína inn á ein í aðramáta so mannsdomineraðan leikvøll uttan at smæðast burtur. Hví skal Kitty May ikki hava loyvi at skifta meining? Dømi eru um onnur, mannfólk sum konufólk, sum snikkaleys eru lopin úr einum flokki til tann næsta – eisini á Løgtingi - uttan at hesi eru úthongd á slíkan niðurgerandi og ærumeiðandi hátt við kynsligum undirtónum.

Eg gevi Sosialinum og Óla P. reytt kort fyri hesa tekning. Um rætt skal vera rætt, so eigur tekningin at verða dømd deyð at vera og strikað í allar ævir. Vónandi tekur fjølmiðlanevndin av sínum eintingum tekningina til viðgerðar, tí mark er fyri, hvussu langt ein fjølmiðil kann loyva sær at fara við sínum útspillingum. Eisini tá talan er um karikaturtekningar.